## St. Mirren fekk hevnd

Fyri einari viku síðani vann Celtic heili 7-0 á St. Mirren, men um vikuskiftið fekk St. Mirren hevnd fyri eyðmýkjandi tapið. St. Mirren vann nevniliga 1-0 á Celtic, og so var frøin ófør á liðnum. Celtic liggur annars á odda í skotsku landskappingini – 34 stig frammanfyri St. Mirren, sum er at finna í niðara enda av deildini.



## Claus spældi við í sigri

Claus Bech Jørgensen fekk seinastu 11 minuttirnar á vøllinum, tá ið Blackpool vann á Norwich í næstbestu ensku fótbóltsdeildini leygardagin. Blackpool var á heimavølli, og eftir málleysa støðu í hálvleikinum skoraði Blackpool tvær ferðir í seinna hálvleiki. Brett Ormerod og Charlie Adam skoraðu málini.

# Gerster gevst í Klaksvík



*Eftir trý ár sum venjari hjá nógv vinnandi Stjørnuliðnum, hevur Henrik Gerster nú boðað frá, at hann gevst eftir hetta kappingarárið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**– Hetta hava verið trý praktfull ár, har vit higartil hava vunnið steypakappingina tríggjar ferðir, landskappingina tvær ferðir og nú aftur skulu spæla FM-finalu, sigur Henrik Gerster, sum gevst sum venjari hjá Stjørnuni eftir hetta kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá Henrik Gerster tann 23. juni í 2006 hevði skrivað undir ein tvey ára sáttmála við Stjørnuna, skrivaði Norðlýsið í yvirskrift, at nýggi venjarin skuldi leiða Stjørnuna til greipuna. Stór orð, gamaní, men nú triðja árið við Gerster sum venjara brátt er farið, hevur tað higartil gingið eftir ætlan hjá Stjørnuni.

Ikki var meira enn hálvtannað ár farið av sáttmálaskeiðnum, tá Stjørnan tann 11. februar í fjør kundi boðað frá, at Gerster tók hetta kappingarárið eisini. Og eftir at Stjørnan bæði í 2007 og 2008 stóð eftir sum greipuvinnari, er felagið enn eina ferð væl á veg til at taka ta triðju greipuna.

Stjørnan hevur longu vunnið steypakappingina í ár, og nú verður so bara bíðað eftir, hvørjum liði Stjørnan skal møta í finalunum um føroyameistaraheitið í ár. Tí kann ikki sigast annað, enn at Henrik Gerster saman við spælarunum væl og virðiliga hevur greitt setningin fyri skeiðið.

### Trý praktfull ár

Men nú eru so dagar hansara sum venjari í Klaksvík skjótt taldir, tí týskvøldið boðaði Henrik Gerster leiðsluni í Stjørnuni frá, at hann gevst sum venjari eftir hetta kappingarárið, og hóskvøldið fingu spælararnir tað so eisini at vita. Og at tíðindini fingu ikki vánaligar avleiðingar, sum slíkar fráboðanir onkuntíð kunnu hava við sær, gekk sjón fyri søgn, tá Stjørnan sunnudagin vant burtur úr StÍF.

– Spælararnir og eg samdust hóskvøldið um, at vit skuldu gera arbeiðið liðugt, og tað haldi eg eisini, at vit vístu á Skála. Og teir áskoðarar, sum hava funnist at okkum, blivu væl og virðiliga tiptir við hasum sera sannførandi sigrinum, sigur Gerster, sum er sera glaður fyri tíðina í Stjørnuni:

– Hetta hava verið trý praktfull ár, har vit higartil hava vunnið steypakappingina tríggjar ferðir, landskappingina tvær ferðir og nú aftur skulu spæla FM-finalu. Eg havi havt nakrar fínar spælarar at arbeitt við og tíðin í Klaksvík hevur verið sera stuttlig, men nú haldi eg, at rætta løtan er at gevast her.

Henrik Gerster sigur, at høvuðsorsøkin til, at hann nú hevur valt at givist sum venjari hjá Stjørnuni, er tí tað kennist í so møðsamt vetur eftir vetur at skula koyra teir 75 kilometrarnar úr Havn til Klaksvíkar fleiri ferðir um vikuna til bæði venjing og dyst.

### Gott spælaratilfar

Tá prátið kemur inn á liðið, sum hann komandi kappingarár skal síggja onkran annan hava ábyrgdina av, heldur Henrik Gerster, at tað í øllum førum er sera gott spælaratilfar, hann letur frá sær til avloysaran – hvør tað so verður:

– Tað er eingin ivi um, at komandi venjarin fær eitt gott lið at arbeiða við. Helst er eitt ættarliðsskifti á veg, men eg vænti ikki, at tað fer at gera stóran mun, tí har eru so nógvir og góðir spælarar, sum saktans kunnu bera Stjørnuna víðari, sigur skjótt fyrrverandi Stjørnuvenjarin, sum enn einki vil siga um, hvat hann møguliga fer at gera næsta vetur. Men hann sigur seg longu nú hava »fleiri bóltar í luftini«, hvat framtíðini viðvíkur.

Tann nú 44 ára gamli Gerster hevur verið partur av føroyskum hondbólti í rættiliga nógv ár. Hann kom til Føroya at spæla við H71 kappingarárið 1987-88, tá hoyvíkingar vunnu bronsu. Og fyri hálvumsætta ári síðani kom hann aftur til Hoyvíkar, umframt at hann eisini var venjari hjá Tjaldri í Runavík eitt skifti, áðrenn leiðin lá til Klaksvíkar, har hann nú skjótt fer at takka fyri seg.

## Rokdystur í Sørvági

**Dómarin noyddist at steðga »vinardysti« millum tey bæði nýggju liðini í Vodafone-deildini, 07 Vestur og AB, tá menn høvdu meira hug at berjast enn at spæla fótbólt**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Nú fótbóltskappingin er farin at nærkast, spæla tey ymsu liðini nógvar vinar- og venjingardystir sínamillum, men tað er ikki altíð, at tað gongur so friðarliga fyri seg, hóast ikki tað stóra skuldi staðið upp á spæl, nú kappingin ikki er byrjað enn.

Vágaportalurin skrivar um ein slíkan dyst í Sørvági í gjár millum uppflytararnar í Vodafone-deildini, 07 Vestur og AB, ið gjørdist so rokaligur, at dómarin noyddist at blása dystin av, hóast einir 5-10 minuttir vóru eftir at spæla.

Tveir spælarar frá AB og ein frá 07 Vestur fingu reyða kortið, og tann eina taklingin var so hørð, at ein spælari mátti á Landssjúkrahúsið. At enda hevði tað so lítið við fótbólt at gera, at ein Suni Johansen, ið dømdi, ikki tordi at lata dystin halda fram, tí »fleiri spælarar kókaðu í vreiði og vóru um at fara til hendurs,« sum Vágaportalurin tekur til.